# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling- djúpt. Túrur nr. 1438
# Tíðarskeið 10/09-01/10-2014

**Fólk við frá Havstovuni:** Jens Arni Thomassen, Hannipoula Olsen, Mourits Mohr Joensen (fyrru helvt)/ Poul Vestergaard (seinnu helvt), Helga Bára Mohr Vang (fyrru helvt)/ Guðrún Bjarnadóttir Bech (seinnu helvt) og Lise Helen Ofstad (fyrru helvt)/ Jákup Reinert (seinnu helvt).

**Ábyrgd:** Lise Helen Ofstad (kanningarleiðari og toktleiðari fyrru helvt).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum er at kanna botnfisk á djúpum leiðum. Hetta er ein innleiðandi yvirlitstroling fyri djúpvatnsfisk í føroyskum sjógvi. Áherðsla verður løgd á at kanna m.a. brosmu, blálongu, gulllaks, stinglaks, langasporl, trantkongafisk og svartkalva. Hitin við botn varð skrásettur.

**Eyka uppgáva:** Fiskar vórðu tiknir til Vísindavøkuna.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 40 mm meskavídd í posanum, rockhopper grunnur, 120 m breitlar og Thyborøn-lemmar. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini á midnátt hóskvøldið 11/9. Á fyrru helvt av túrinum blivu støðirnar á Føroyabanka, Bill Bailybanka (Ytrabanka), Lúsabanka (Ytstabanka), Wyville Thomsonrygginum, suður, vestur og norður av Landgrunninum og nakrar støðir á Íslandsrygginum tiknar (Mynd 1). Landaðu í Havn 22/9. Seinna helvt av túrinum byrjaði á middegi 23/9. Støðirnar á Íslandsrygginum og eystanfyri blivu tiknar. Veðrið var sera gott fyrru helvt, men ikki serliga gott seinnu helvt av túrinum. Skipið lá bakk í tvey samdøgur. Nakrar støðir blivu ikki tiknar vegna ringan botn ella tí at gørn stóðu á leiðini. Støðir vantaðu í, tí tíðin gekk undan vegna vána veður.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bú.stig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg undantikið gulllaks (bú.stig 1-7, eigin), kongafisk (bú.stig 1-4, talva 4.4.3), langasporl (bú.stig 1-4, talva 4.4.5), havtasku (bú.stig 1-5, eigin) og stinglaks (bú.stig 1-5, Gordon et al. 2000).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miðast skal ímóti at upparbeiða tað mesta umborð, ella í seinasta lagi 1. desember 2014.

**Fyribilsúrslit:** Hetta var fyrsti túrurin í vónandi eini røð av líknandi túrum í framtíðini, og tí er ikki møguligt at bera saman við onnur ár. 121 støðir vórðu tiknar og harav vórðu 110 góðkendar. 93 ymisk sløg vórðu skrásett og av hesum vóru 83 ymisk fiskasløg. Mest varð fingið av svartkjafti, og síðan komu havmús, lítli kongafiskur, stinglaksur, og gulllaksur. Gýtandi gulllaksur varð fingin vestan fyri Mykines á umleið 600 m dýpi. Eisini vóru hál við gýtandi búksvarta hávi og nevhávi fingnir á túrinum.




**Mynd 1.** Yvirlit yvir støðir á túri 1438.

**Talva 1.** Veiða, nytrur, magar og tal av støðum tikin á túri 1438 – yvirlitstroling djúpt.

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| SVARTKJAFTUR | 13512.448 | | | 102 |
| HAVMÚS | 7607.525 | | 5 | 52 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 6157.210 | 21 | 1 | 50 |
| STINGLAKSUR | 5170.117 | 150 | 8 | 18 |
| GULLLAKSUR | 3764.211 | 201 | 15 | 81 |
| NEVHÁVUR | 3216.724 | | | 14 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 2767.786 | 16 | 4 | 53 |
| TRANTKONGAFISKUR | 2533.493 | 216 | 22 | 58 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 2318.437 | 106 | 5 | 40 |
| BLÁLONGA | 1544.313 | 228 | 64 | 55 |
| SKRUBBHÁVUR | 1508.509 | | | 15 |
| SVARTKALVI | 1482.567 | 75 | 21 | 33 |
| TINDASKØTA | 1199.836 | | | 37 |
| HÝSA | 1071.602 | 45 | 15 | 8 |
| SKRAMBUL | 490.481 | | | 86 |
| LONGA | 335.420 | 71 | 7 | 20 |
| BROSMA | 302.337 | 145 | 5 | 57 |
| KUBBUTA LANGASPORL | 277.296 | 69 | 10 | 15 |
| TOSKUR | 242.055 | 38 | 13 | 11 |
| LÍTLA BROSMA | 230.004 | 36 | 1 | 40 |
| SVARTHÁVUR | 211.968 | | | 12 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 203.818 | | | 46 |
| HALAHVASSA SKØTA | 198.505 | | | 9 |
| UPSI | 188.515 | 6 | 3 | 11 |
| HAVTASKA | 175.405 | 26 | 9 | 18 |
| BUKSVARTI HÁVUR | 175.112 | | | 26 |
| BLÁGOMUR | 169.625 | 1 | 1 | 12 |
| ÚLVFISKUR | 117.325 | 2 | 1 | 27 |
| KIKARAFISKUR | 98.951 | 4 | 4 | 12 |
| HVÍTASKØTA | 95.980 | | | 8 |
| SILVURMURTUR | 94.731 | 5 | | 22 |
| SLÆTTHØVD | 92.586 | 1 | | 5 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 88.606 | 10 | | 21 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 78.692 | | | 11 |
| MORA | 69.300 | 10 | | 11 |
| LOLIGO | 63.705 | | | 6 |
| LÁLLA | 61.231 | | | 15 |
| KNURRHANI | 58.056 | | | 3 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| BLÁRIDDARI | 56.014 | 9 | | 24 |
| ÚLVFISKABRÓÐIR | 52.561 | | | 7 |
| GLÝSUFISKUR | 49.488 | | | 3 |
| RÍSNA LANGASPORL | 41.137 | 19 | 1 | 7 |
| SKØTA (BATIS) | 40.770 | | | 4 |
| HVASSASPREK | 35.853 | | | 11 |
| TINDABAK | 34.845 | | | 6 |
| LÝSINGUR | 32.095 | 4 | | 4 |
| SANDSKØTA | 31.995 | | | 8 |
| COLLETTS BUKSVARTI HÁVUR | 31.365 | | | 4 |
| SVARTFISKUR | 27.906 | 1 | | 6 |
| FJAÐURFAGRA HAVMÚS | 27.284 | | | 3 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 20.893 | | | 3 |
| ÍSHAVSSKØTA | 18.940 | | 2 | 2 |
| LIRI | 17.505 | 4 | 2 | 5 |
| KLINGRUSKØTA | 14.637 | | | 12 |
| KLÆNASPORL | 10.034 | 10 | | 10 |
| REYÐKRABBI | 8.205 | | | 6 |
| REYÐA HORNABROSMA | 4.365 | 5 | 3 | 3 |
| KRYTTLINGUR | 4.175 | | | 8 |
| TUNGA | 3.619 | | | 5 |
| SILVURKALVI | 3.010 | | | 2 |
| HAVÁLLUR | 2.980 | | | 1 |
| RÆKJA | 2.731 | | | 15 |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 2.731 | | | 23 |
| STREYMSILD | 2.595 | | | 1 |
| LÍTLI GLAMUR | 1.507 | | | 9 |
| FERBLETTUTA HVOYSA | 1.446 | | | 1 |
| KRØKILSKRUTT | 1.178 | | | 6 |
| ÍSHAVS SÚGFISKUR | 0.551 | | | 6 |
| TRØLLAKRABBI | 0.515 | | | 1 |
| SVARTI SÚGFISKUR | 0.435 | | | 4 |
| LAKSTOBIS | 0.430 | | | 3 |
| LANGASPORL | 0.306 | | | 1 |
| SILD | 0.300 | | | 1 |
| VAHLS ÚLVFISKUR | 0.298 | | | 1 |
| STÓRA LAKSTOBIS | 0.260 | | | 1 |
| BOA-DREKAFISKUR | 0.254 | | | 5 |
| TUSSAFISKUR | 0.248 | | | 1 |
| GLÆMUFISKUR | 0.243 | | | 1 |
| KÁMI ÚLVFISKUR | 0.228 | | | 2 |
| SNIPUÁLLUR | 0.213 | | | 4 |
| SMÁSKRUBBUTA HVOYSA | 0.210 | | | 1 |
| LÍTLI KRYTTLINGUR | 0.099 | | | 1 |
| MJÁIKJAFTUR | 0.095 | | | 1 |
| SLOANS ORMFISKUR | 0.074 | | | 2 |
| KROKODILLUPRIKKAFISKUR | 0.057 | | | 1 |
| LAKSSILD | 0.055 | | | 4 |
| GUNTERS LANGASPORL | 0.052 | | | 1 |
| ELEDONE | 0.048 | | | 1 |
| LÍTLI PRIKKAFISKUR | 0.045 | | | 7 |
| LÍTLA LAKSTOBIS | 0.043 | | | 2 |
| OCTOPUS | 0.034 | | | 1 |
| LÍTLI KIKARAFISKUR | 0.020 | | | 1 |
| MAKRELUR | 0.005 | | | 1 |
| DJÚPÁLLUR | 0.004 | | | 1 |
| TILSAMANS | 58561.468 | 1534 | 222 | 110 |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum ”Tur1438.docx”.

<u>Lise H. Ofstad</u>